

*Kappingin var á fyrsta sinni hildin í 2002, og tá vóru tað einans føroyskir miðnámsskúlar, sum vóru við*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Tekniski Skúli í Klaksvík vann aftur

**Xplore kappingin millum miðnámsskúlar varð hildin á øðrum sinni í seinastu viku. Hesa ferð við luttøku frá 16 miðnámsskúlum úr fimm londum. Hóast kappingin var munandi herd, sýndu næmingar á Tekniska Skúla í Klaksvík seg aftur sum teir knáastu**

NÝGGJ ÚTFLUTNINGSVØRA

*Tekstur Jan Müller*
*Myndir Jens K. Vang*

Oljusimulatiónin Xplore gevur eina grundleggjandi fatan av, hvat oljuleiting snýr seg um. Luttakararnir verða býttir í smáar bólkar við trimum ella fýra í hvørjum, og tey skulu so royna at finna olju í rakstrarverdum nøgdum. Bólkarnir kappast sínamillum, og dugnaligasti bólkurin er tann, sum finnur mesta virðið av olju samanborið við peningin, sum tey hava brúkt.

Kappingin var á fyrsta sinni hildin í 2002, og tá vóru tað einans føroyskir miðnámsskúlar, sum vóru við. Ta kappingina vunnu Hallur Joensen, Rói Jacobsen og Gunnleivur Biskopstø av Tekniska Skúla í Klaksvík.

Hesa ferð vóru skúlar úr Íslandi, Noregi, Danmark og Skotlandi eisini bjóðaðir við, men hóast hetta, vóru næmingar av Tekniska Skúla í Klaksvík aftur nógv bestir og vunnu bæði fyrsta og annað pláss.

Vinnarar gjørdust Marner Joensen, Markus H. Sørensen og Poul Ingi Olsen, sum saman við tveimum bólkum av Borgarholtsskólanum í Reykjavík, eisini vóru stinnastir í innleiðandi umførunum, ið vóru mánadagin, týsdagin og mikudagin.

Av teimum 99 bólkunum, sum luttóku, endaðu 24 í finaluni fríggjadagin, harav fjúrtan føroyskir. Fimm teir bestu bólkarnir í finaluni vóru:



*Hesa ferð vóru skúlar úr Íslandi, Noregi, Danmark og Skotlandi eisini bjóðaðir við, men hóast hetta, vóru næmingar av Tekniska Skúla í Klaksvík aftur nógv bestir og vunnu bæði fyrsta og annað pláss*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

1. Marner Joensen, Markus H. Sørensen og Poul Ingi Olsen av Tekniska Skúla í Klaksvík

2. Thordur A. Egholm, Jóan Petur á Stongunum og Ólavur Jensen av Tekniska Skúla í Klaksvík

3. Marna Leila Vandsdal, Arnóra Dímun Persson og Sára Jógvansdóttir av Føroya Handilsskúla Tórshavn

4. Steven Gilchrist, Derek Stewart og Robert Watt frá Cogent Modern Apprenticeships í Aberdeen

5. Rakul Heygsá, Arne Debes Winthereig og Duruta Hentze Sørensen av Føroya Handilsskúla Tórshavn

Marner, Markus og Poul Ingi verða heiðraðir á oljuráðstevnuni Offshore Faroes 2003, sum verður týsdagin 2. desember í Norðurlandahúsinum. Vinningurin er 15.000 kr, umframt ein ferð til Aberdeen.

Samanlagt luttóku 325 lesandi úr 16 miðnámsskúlum, harav umleið helvtin av luttakarunum vóru úr Føroyum. Eisini vóru 40 vegleiðarar knýttir at tiltakinum, og hesir høvdu til uppgávu at stuðla teimum lesandi, stimbra samstarvi og at svara ivamálum. Vegleiðarar á Tekniska Skúla í Klaksvík vóru Nikolas Olsen og Linjon Jacobsen.

Xplore var ókeypis hjá skúlunum at luttaka í, men var fíggjarliga stuðlað av NORA, Eni, Atlantic Airways, Føroya Sparikassa og Føroya TELE. Tað var aftur í ár Tökni, sum skipaði fyri. Meira kann lesast á www.xplore.fo



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Kári Slættanes seksti



Meðan seinasti leygardagur spakuliga og alsamt tærdist upp í tíðarinnar havi fylti Kári Slættanes seksti ár, stillisliga og uttan hóvasták. Hóast røtur vesturi í Vágum so býr hann røttu megin Sandá og kann tí kallast havnamaður.

Seinasti mongu árini hevur Kári verið stjóri á einmannsfyritøkuni, Føroya Tubbakssøla. Hann selir tubbak kring alt landið og hevur neyvt samband við kundarnar. Hann lívgar føroyingar við svøtum balli, Samson, útlendskum sigarettum, sum um føroyingar nakrantíð hava framleitt sigarettir, og ikki um at tala snús.

Eitt eyðkenni fyri Kára er, at tað sum hann gongur upp í, tað gongur hann upp í og hansara lítla fyritøka beint omanfyri kirkjugarðin verður rikin sum ein mynsturfyritøka.

Av lyndi er Kári nokk so stúrin og hevur hug at síggja svart. Um tað hevur nakra ávirkan, at fyritøka hans er nærmasti granni til kirkjugarðin í Havn, veit eg ikki at siga, men hann sleppur ikki í bilin, ella hann fær ikki hugt út av vindeyganum í fyritøku síni uttan hann sær oman í hetta havið av grøvum, har tær nýggjastu skyggja burturúr, við feskum kransum sum ein støðug áminning um lívsins gong og enda. Tú skal vera sterkur at arbeiða í slíkum umhvørvi. Og hóast alsama stúran í heiminum, so endurføðist ein nýggjur dagur hvønn dag, og soleiðis verður tað til okkara dagur einaferð kemur.

Men Kári er eisini skemtari, tá góða lagið er á honum og hann er hugnaligur í samkomu og veit at siga frá. Kári er ógvuliga trúfastur vinur og hann røkir síni. Familjuna gongur hann nógv upp í, barnabørnini lívga upp.

Seinastu árini hevur Kári latið seg í gonguskógvarnar og hann bjóðar fjøllum av uttan at himprast. Hann er fastur og fúsur í Gongufelagnum. Og streym ræðist hann heldur ikki. Nú hevur hann fingið nýggjan bát. Hetta er ikki fiskibátur, men ein stuttleikabátur og hann verður ivasleyst at síggja í regattasiglingum í framtíðini bæði í Føroyum og uttanlands.

Kári fer nú undir lívsheystið, sjey ár eru eftir til aldursrentuaftan og dagarnir koma og fara um ein vil tað ella ikki og við somu ferð hjá øllum. Við eini góðari familju, eini konu sum hann forgudar og góðum áhugamálum, so fer Kári neyvan av egnum vilja at liggja á sofuni. Og vit, hansara vinir, gleða okkum at fylgjast við honum framá, hvussu og hvussu leingi ána vit ikki, og tað stúra vit heldur ikki fyri.

Heili trýss ár her á fold er ikki hissini gáva, um vit rokna hvønn dag sum eina gávu frá Gudi, tá vit nú einaferð liva her upp á lánta tíð, ein dag í senn.

Vinarliga

**Jústinus Leivsson Eidesgaard**

## Dagurin

**26. november. Konrad,** deyður í 975. Týskur fúrstasonur, sum seinni bæði gjørdist dómpróstur og biskupur. Læt byggja bæði kirkjur og sjúkrahús og kleystur. Varð skírdur halgimenni í 1123.

Konrad er týskt navn og upprunaliga av einum orði, sum merkir *hin ráðatøkni.*

Ásmundur Guðjónsson:

## Nýggjur ráðgevi hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum

Ásmundur Guðjónsson í Havn er settur í starv sum ráðgevi hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum. Hann hevur eitt skifti verið leiðari og samskipari av fiskivinnuroyndum. Hann skal arbeiða í stýrisbólkinum fyri norðurlendskt umhvørvis- og fiskivinnusamstarv.

Høvuðsuppgávan í norðurlendska fisikivinnusamstarvinum er at virka við til at menna fiskivinnuna sum eitt týðandi samfelags- og búskaparligt ískoyti við atliti til virksemi í teimum londum og økjum har fiskivinnan hevur størst týdning.

Grundleggjandi í norðurlendska samstarvinum er at vistfrøðisliga skipanin verður vard og at veiðan er burðardygg. Norðurlendska fiskivinnusamstarvið hevur eina játtan í ár uppá 7,4 milliónir danska krónur.



Høvuðssæti hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum er í Keypmannahavn. Ásmundur Guðjónsson er settur í fýra ár, men starvið kann leingjast tvær ferðir við tveimum árum.

## Havbúnaðarfelagið nýggjan formann

Nevndin í Havbúnaðarfelagnum hevur valt Atla Gregersen til nýggjan formann í felagnum.

Fyri stuttari tíð síðani avgjørdi Høgni Jacobsen, sum síðan í summar hevur verið virkandi formaður í felagnum, at taka seg úr nevndini.



Nevndin í Havbúnaðarfelagnum hevur nú valt Atla Gregersen til nýggjan formann. Atli hevur sitið í nevndini í Havbúnaðarfelagnum næstan frá byrjan fyrst í 80'unum, við undantøku av fýra árum fyrst í 90'unum.

Nevndarlimirnir í felagnum eru Suni Djurhuus, Grímur Rasmussen, Hans Jacobsen, Bogi Jacobsen og nýggi formaðurin, Atli Gregersen.

## Tórhild Magnussen 40 ár



Týsdagin 25 november fylti Tórhild Magnussen í Havn 40 ár. Tórhild er ættað úr Tjørnuvík 40 ár. Hon er dóttir Thoru og Hans Magnussen, bæði úr Tjørnuvík. Tórhild er yngst av fýra syskjum.

Hon er skrivstovukvinna og hevur verið 15 ár á skrivstovuni á Føroya Handilsskúla, har hon enn hevur sítt dagliga yrki.

Hon hevur sitið í nevndini fyri Parkinsonfelagið frá 1998 til 2003. Tvey tey fyrstu árini sum skrivari og síðani sum formaður.

Hon er løtt av lyndi, og henni dámar væl at syngja, og syngur hon við í fleiri kórum. Mentað fólk sum hon er, er hon sjálvandi eisini við í Kingo-bólkinum í Tjørnuvík, har hon er "programleiðari" og bólkinum ein dyggur stuðul.

Tórhild er gift við Jógvan F. Olsen úr Hósvík. Tey eru búsitandi í Hvalsoyargøtu í Havn, har mangur hevur sitið væl og nýtt gestablíðni og tí dettur oftani nógv fólk inn á gólvi. Tey eiga sonin Ára.

**Vinir**

*Íbúð í Keypmannahavn til starvsfólk*

Fyri eitt av okkara starvsfólkum verður, vegna økt virksemi uttanlands, sóknast eftir íbúð í Keypmannahavn til framleigu frá desember og umleið 7 mánaðir fram. Farið verður væl um og goldið verður rættstundis.

Atlants Tøkni er 3 ára gomul føroysk fyritøka, ið veitir skikkaða KT- og ráðgevingartænastu. Fyritøkan hevur serkunnleika innan menning av skipanum í Microsoft og Oracle umhvørvi. Atlants Tøkni hevur servitan um fleiri øki innan almenna umsiting og tað privata, t.d. billingskipanir, fíggjarskipanir og trygging.

**Atlants Tøkni**
Bryggjubakka 4
Postsmogu 277
FO-110 Tórshavn
Tel 32 20 90
Fax 32 20 92
Teldupostur: att@att.fo
www.att.fo

Atlants Tøkni

REPROZ